| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**31. mai 2012** | Blað nr.:<br>**9767** |
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **31. mai 2012** **kl. 17.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 129/12-158/12**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Maria H. Olsen
Halla Samuelsen
Elin Lindenskov
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Jákup Símun Simonsen

**LUTTÓKU EISINI:**

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av máli 2012-0178

**133/12** **2012-0178**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 31. mai 2012:** Tikið til eftirtektar.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av máli 2010-0664

**134/12** **2012-0664 SG**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2012**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 29. mars 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 2. mai 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mars 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 31. mai 2012:** Framlagt og góðkent.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av máli 2012-0991

**135/12** **2012-0991/2 SG**

**Framfluttar játtanir**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at roknskapurin fyri 2011 verður gjørdur upp, verður eisini gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2012.

Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. T.v.s. við tveimum viðgerðum.

Yvirlitið verður lagt fram saman við fyribils roknskapinum fyri 2011.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting av t.kr. 32.919 netto, til rakstur og t.kr. 119.019, netto, til íløgur.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 31. mai 2012:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av máli 2008-0257

**136/12** **2008-0257 TK-P**

**Nevndarviðgerð: Glyvursvegur 5. byggistig – Eykajáttan í sambandi við goymslu í grótbrotinum á Glyvursnesi til avgreystur og broyting av vegaskráum í ovara borð**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Víst verður til mál j. nr. 2007-2302 : Nevndarviðgerð: Glyvursvegur 5. byggistig – Útbjóðing Arbeiðstøka.

Í sambandi við grevstrararbeiði av 5. stigi av Glyvurvegi er tað staðfest, at tilfarið, ið ætlanin er at nýta til ífyllu v.m., ikki kann nýtast til vegarbeiðið. Heldur ikki ber til at fáa tilfarið flutt á lendið hjá bóndanum, tí tað er so vánaligt. Neyðugt hevur tí verið at flutt tað út í grótbrotið á Glyvursnesi, har ætlaða tyrvingarplássið skal gerast.

Umsitingin fekk øll neyðug loyvir til vega at leggja yvirskotstilfar til bóndan Poul Müller í sambandi við grevsturin, hetta fyri at sleppa frá at koyra tilfarið niðan í Húsahagan. Meiningin var at fáa økið hjá bóndanum til slótturbø.

Nú arbeiðið er byrjað av álvara, vísir tað seg, at tilfarið gjøgnumgangandi er sera vánaligt. Kanningar á starvsstovu og hjá Landsverk vísa, at tilfarið er óegnað til at nakað kann vaksa í tí. Bóndin hevur sýtt fyri at taka ímóti tilfarinum. Tó er nakað av tilfari uttan svørð lagt á goymslu í grótbrotinum til skráar, men her má annað tilfar blandast uppí, fyri at tað kann brúkast sum ráјørð. Mold er so at siga ongin á økinum. Her má finnast ein onnur loysn og mold fáast til vega aðrastaðni frá.

Vegaøkið og alt Glyvursnes er ridluskriðaøki og ikki er loyvt at koyra nakað tilfar yvir um Sandá. Hetta hevur ført við sær, at umsitingin hevur verið noydd at troyta arðar møguleikar í sambandi við yvirskotstilfar.

Grótbrotið á Glyvursnesi er einasta loysnin sum er. Tvey økir eru nýtt sum fyribilslagur, tað er økið A og B. Tað triðja økið C verður brúkt til endaliga goymslu. A og B liggja sunnanvert í grótbrotinum og C liggur norðanvert niðan ímóti beninum. Økið C er umleið 6.000 m², 100 m langt og 60 m breitt. Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til avtalu við Búnaðarstovuna og bóndan um økini.

Loysn A:
Fyri at kunna nýta økið C, er verandi vegur niðan á benið hampaður, ein vegur er gjørdur fram við beninum og eitt tippi er fyrireikað. Lastbilar koyra frá vegagerðini “Glyvursvegur 5. byggistig” og út til økið C. Fylt verður síðani í tveir sokallaðar Grísar, og koyrt verður niðan á benið og vippa út av tippinum. Benið er umleið 20 m høgt. Á henda hátt ber til at fáa eina goymslu, sum tekur umleið 70.000 m³ lm.

Loysn B:
Arbeitt hevur eisini verið við at kanna møguleikan at leggja tilfarið upp í rúgvu niðri á sløttum, men henda loysnin ber ikki til í veruleikanum. Tilfarið er ikki til at koyra á við tungum maskinum, og ikki ber til at fylla hægri enn 3 m. Loysn B er tískil vrakað.

Økonomisk viðurskiftir:
Tá ikki ber til at koyra tilfar til bóndan sum ætlað í útbjóðingartilfarinum, inniber hetta fylgjandi:

1. Strekkið verður longri. Tað er frá bóndanum Poul Muller og út í grótbrotið á Glyvursnesi. Víst verður til avtaluseðil nr. 1 millum Articon P/f og Tórshavnar kommunu. Meirkostnaður kr. 300.000,-.
2. Loysn A hevur eina meirútreiðslu tilskilað niðanfyri:
a. Planering av vegi niðan á benið – planerað verður við 0-50 og trumlað. Longd 120 m. Kostnaður kr. 160.000,-.
b. Gerð av vegi fram við beninum uml. 80 m. Kostnaður kr. 120.000,-.
c. Gerð av rampu og stoppklássa uppi á beninum. Kostnaður kr. 45.000,-.
d. Lessing frá fyribilsgoymslu 8 kr/m³ lm, koyring við Grísum 12 kr/m³ og dosing 5 kr/ m³ lm, tvs. 25 kr/ m³ lm at fáa tilfarið frá fyribils goymslu og niðan í økið C. Um vit rokna við 70.000 m³ lm gevur hetta kr. 1.750.000,-.
e. Ein verjugarður av gróti verður gjørdur um neyðugt niðri í brotinum fyri at halda tilfarið innan fyri økið C. Hetta kostar kr. 275.000,- uttan veiting av gróti. Ætlanin er at fáa grót til vega frá Tórshavnar Havn, sum liggur í brotinum. Veiting av gróti er mett til kr. 200.000,-.
3. Samlað meirveiting er mett til kr. 3.000.000,- v/mvg.

Víst verður til avtaluseðil nr. 9 millum Articon P/f og Tórshavnar kommunu.

Kunning til TN um vegakráar í ovara borð:
Neyðugt verður eisini at leggja skráan niður í ovara borð á "Glyvursvegur 5. byggistig. Hetta inniber ein meirkostnað. Ein kann samanlíkna støðuna við vegarbeiðið "Sambindingarvegur Klingran – Løgmannabreyt".
Umsitingin hevur latið gjørt supplerandi kanningar til gjørdar graviroyndir á økinum við Georadara. Nýggir tvørskurðir verða í løtuni gørdir út frá viðurskiftunum á staðnum. Endaligu meirnøgdirnar eru ikki tøkar enn.
Eisini má tilfar til skráar sum rájørð fáast til vega aðrastaðni frá til at blanda uppí tilfar frá staðnum, sum er á goymslu í grótbrotinum á Glyvursnesi. Eisini má mold fáast til vega til skráarnar.
Talan verður eisini talan um minniveiting tí t.d. verður onki tilfar koyrt niðan í Húsahagan.
Ein endalig uppgerð verður gjørd, og málið um skráar og eyka játtan til hetta arbeiðið verður lagt fyri nevndina aftur skjótast.
Roknað er við 10% til ókent í samlaðu kostnaðarmetingini fyri alt vegaarbeiðið. Tað er umleið kr. 2.000.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, at játta kr. 2.000.000,- í sambandi við meirkostnað í sambandi við at sleppa av vit yvirskotstilfar.

**Tekniska nevnd 7. februar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina við áheitan um at fíggja meirkostnaðin av verkætlanini fyri kloakkleiðingina frá útstykkingini undir Kongavarða (j. nr. 2007-0292).

**Fíggjarnevndin 20. februar 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. februar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin greiðir frá støðuni í málinum um 5. stig.

**Tekniska nevnd 5. februar 2009:** Kunnað varð um málið.

- Tekniska nevndin skal taka støðu til meirveitingar í sambandi við innanhýsis frágreiðing um fíggjarligu viðurskiftini frá tekniska stjóranum og um niðurstøðuna frá bygginevndini um ikki at koma við tilmæli til teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Einar Brimnes var ikki til staðar undir viðgerðini.

Tekniski stjórin greiddi frá innanhýsis statusfrágreiðingini frá 2. febr. 2009, um 5. og 6. byggistig.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Maria Hammer Olsen og Jákup Símun Simonsen, samtykti at taka spariuppskotini til eftirtektar, og at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 20,4 mió. afturat til 5. og 6. byggistig.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, metir seg ikki kunna taka støðu til málið enn, av tí at hann fekk tilfarið í málinum sama dag, sum fundurin varð hildin.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki á fundinum, meðan nevndin viðgjørdi bygginevndina.

Ein meiriluti átalar harðliga handfaringina hjá bygginevnd og umsiting í málinum. Somuleiðis tekur nevndin, ikki undir við, at bygginevndin ikki vil geva nevndini tilmæli í málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Mál nr. 2008-0257 og 2008-1295 vóru viðgjørd undir einum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í teknisku nevnd.

Eisini samtykt at seta í verk óvilduga kanning fyri at staðfesta ábyrgd í hesum málum.

**Býráðið 19. februar 2009:** Einmælt samtykt.

- Kunnað verður um gongdina í málinum á 5. og 6. byggistigi.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Málið um endaligan byggiroknskap fyri Glyvursveg 5. stig hevur verið til viðgerðar í bygginevndini 9. mars 2012. Tilmælið frá bygginevndini verður framlagt á fundinum.

**Tekniska nevnd 15. mars 2012:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá bygginevndini (Sí j.nr. 2007-1283/18).

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Útsett.

Tilmæli kemur til fundin.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Útsett.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin hava havt fundir við SEV og FT-Net, at kanna um møguleikar vóru fyri at gera semju millum partarnar. Úrslitið av fundunum var, at SEV og FT-Net eru sinnaðir at gera semju við kommununa um at rinda helvtina av kravi kommununar.

Kommunan kravdi upprunaliga kr. 1.001.129,- frá SEV og kr. 645.443,- frá FT-Net. Umsitingin greiðir frá uppskotinum til semjur. Víst verður til skjal nr. 2008-1295/17.

Við hesum uppskotum til semju gerst samlaða úrslitið av byggiroknskapunum fyri bæði byggistigini fylgjandi:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Glyvursvegur 5. Byggistig: | hall á | kr. | -615.485,- | |
| Glyvursgevur 6. Byggistig: | avlop á | kr. | 178.782,- | |
| Nettoúrslit: | hall á | kr. | 463.997,- | v. mvg |

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið til semju. Víst verður til frásøgn nr. 11 frá fundi í bygginevndini, j. nr. 2007-1283/19.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir nevndini til at taka undir við uppskoti til semju við SEV og FT-Net um helvtarbýti, galdandi fyri Glyvursvegur 5. byggistig (j. nr. 2008-0257) og Glyvursvegur 6. byggistig (j. nr. 2008-1295), og, um avgjørt verður at taka undir við semjuni, at beina málið um fígging í hesum sambandi, í býráðið um fíggjarnevndina, við tilmæli um hvussu hallið skal fíggjast.

**Tilmæli frá umsitingini:**
Vísandi til tilmæli frá bygginevndini, um at gera semju við SEV og FT-Net, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at fíggja írestandi upphædd álj. kr. 463.997,- fyri 5. og 6. stig av Glyvursvegi,- av íløgum fyri vegir 2012, §6, kto. 8175 – Glyvursvegur.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av máli 2008-1295

**137/12** **2008-1295 TK-P**

**Glyvursvegur 6. byggistig: Fyrispurningur frá Articon P/f um at leingja verandi sáttmálan fyri Glyvursvegur 5. byggistig til eisini at umfata Glyvursvegur 6. byggistig**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Víst verður til mál nr. 2007-1458 - Dispositiónsuppskot: Nevndarviðgerð - Glyvursvegur 6. byggistig.

P/F Articon hava sett fram fyrispurning, um Tórshavnar kommuna er áhuga í at leingja verandi sáttmála fyri Glyvursvegur 5. byggistig til eisini at umfata part av Glyvursvegur 6. byggistig. Tað er frá arbeiðstøkumarki fyri Glyvursveg 5. byggistig og suður um útstykkingina á Hamrinum á Argjum. Somu einleikaprísir verða nýttir sum í verandi projekti.

Verður fyrispurningurin gingin á møti, kemur hetta at spara kommununi eitt sindur av tíð.

Articon P/f ger spreingi- og planeringsarbeiðið í sambandi við nýggja skúlan á Hamrinum á Argjum.

Nú grevstrararbeiðið í sambandi við Glyvursveg 5. byggistig er um at vera liðugt, er møguleiki hjá Articon P/f at halda fram við Glyvursvegur 6. byggistig við tað sama. Eisini er munandi lættari at planleggja arbeiðini, tá tað er sami arbeiðstakari. Her verður eisini hugsað um grótjavnvág. Meiningin er eisini at nýta grót frá skúlanum á Argjum til vegaføringarnar.

Fyritreytirnar viðvíkjandi eigaraviðurskiftunum við Búnaðarstovuna mugu fáast í rættlag, áðrenn farið verður undir arbeiðið.

**Fíggjarlig viðurskifti.**

Tað fyriliggur í løtuni einki detailprojekt av 6. stigi, og tí er trupult at meta um samlaða kostnaðin fyri verkætlanini. Leystliga mett kemur arbeiðið at kosta uml. 10-12 mió. kr. Strekkið, talan er um, er uml. 450 m.

Onki avsett á fíggjarætlanini fyri 2008 til 6. byggistig, men hinvegin eru avsettar kr. 7,5 mió. til prosjektering av brúgv um Sandá, sum er Glyvursvegur 4. stig. Tað verður tó ikki komið so langt við hesum arbeiði í 2008 sum upprunaliga ætlað. Sama ger seg galdandi fyri aðrar íløgur, ið eru ætlaðar at verða gjørdar í 2008. Tí metir tekniska umsitingin, at tað er møguligt at gera nakrar umraðfestingar innan íløgurnar fyri 2008, við tí fyri eyga at halda fram við arbeiðinum av Glyvursvegnum 6. stig.

Á hesum grundarlagi mælir tekniska umsitingin til at umraðfesta íløgurnar og flyta játtan til Glyvursveg 6. stig soleiðis:

| Konto | Verkætlan | Broyting 2008 | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | **Fígging til Glyvursvegur 6. stig** | | |
| 11871 | Glyvursvegur 6. stig | 150.000 | restjáttan frá 2007 ella fyrr |
| 11868 | *at flyta frá brúgv um Sandá | 5.000.000 | er viðmælt av bygginevndini á fundi 07.05.08 |
| 11822 | *at flyta frá Glyvursvegur | 300.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11841 | *at flyta frá Reynsgøtu | 400.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11848 | *at flyta frá gongubreyt við Vegin Langa | 300.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11863 | *at flyta frá ferðslutrygd v. Hoyvíkar skúla | 370.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11889 | *at flyta frá vegagerð á Dánjalstrøð | 2.000.000 | játtan frá 2007 |
| 11875 | *at flyta frá vegur, kloakk o.a. á útstykking á Argjum hjá V. Dalsgaard (komm. partur) | 3.330.000 | játtan frá 2008 |
| | **Tilsamans** | **11.850.000** | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
1. at arbeiða fram ímóti at gera eina avtalu við P/F Articon um kostnað og tíðarætlan fyri leingjan av Glyvursvegi til verandi íbinding til útstykkingina á Hamrinum
2. at játta kr. 11,7 mió. til konto 1011-90-11871 við flytingum, sambært omanfyri standandi yvirliti.
3. at heita á umsitingina fyri keyp og sølu um beinanvegin at gera avtalu við Búnaðarstovuna um keyp av lendi.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti Høgni Mikkelsen tekur støðu á fíggjarnevndarfundi.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 26. mai 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin greiðir frá støðuni í málinum um 6.stig.

**Tekniska nevnd 5. februar 2009:** Kunnað varð um málið.

- Tekniska nevndin skal taka støðu til meirveitingar í sambandi við innanhýsis frágreiðing um fíggjarligu viðurskiftini frá tekniska stjóranum og um niðurstøðuna frá bygginevndini um ikki at koma við tilmæli til teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Einar Brimnes var ikki til staðar undir viðgerðini.

Tekniski stjórin greiddi frá innanhýsis statusfrágreiðingini frá 2. febr. 2009, um 5. og 6. byggistig.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Maria Hammer Olsen og Jákup Símun Simonsen, samtykti at taka spariuppskotini til eftirtektar, og at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 20,4 mió. afturat til 5. og 6. byggistig.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, metir seg ikki kunna taka støðu til málið enn, av tí at hann fekk tilfarið í málinum sama dag, sum fundurin varð hildin.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki á fundinum, meðan nevndin viðgjørdi bygginevndina.

Ein meiriluti átalar harðliga handfaringina hjá bygginevnd og umsiting í málinum. Somuleiðis tekur nevndin, ikki undir við, at bygginevndin ikki vil geva nevndini tilmæli í málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Mál nr. 2008-0257 og 2008-1295 vóru viðgjørd undir einum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í teknisku nevnd.

Eisini samtykt at seta í verk óvilduga kanning fyri at staðfesta ábyrgd í hesum málum.

**Býráðið 19. februar 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Málið um endaligan byggiroknskap fyri Glyvursveg 6. stig hevur verið til viðgerðar í bygginevndini 9. mars 2012. Tilmælið frá bygginevndini verður framlagt á fundinum.

**Tekniska nevnd 15. mars 2012:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá bygginevndini (Sí j.nr. 2007-1283/18).

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Útsett.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt samráðingar við SEV og FT-Net. SEV og FT-Net eru sinnaðir at gera avtalu við kommununa um helvtarbýti av útreiðslunum.

Kommunan kravdi upprunaliga kr. 1.001.129,- frá SEV og kr. 645.443,- frá FT-Net. Umsitingin greiðir frá avtaluni. Víst verður til skjal nr. 2008-1295/17.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við uppskotinum til avtalu um helvtarbýti og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 19. apríl 2012:** Málið tikið av skrá.

Tilmæli kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2012:** Útsett.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin hava havt fundir við SEV og FT-Net, at kanna um møguleikar vóru fyri at gera semju millum partarnar. Úrslitið av fundunum var, at SEV og FT-Net eru sinnaðir at gera semju við kommununa um at rinda helvtina av kravi kommununar.

Kommunan kravdi upprunaliga kr. 1.001.129,- frá SEV og kr. 645.443,- frá FT-Net. Umsitingin greiðir frá uppskotinum til semjur. Víst verður til skjal nr. 2008-1295/17.

Við hesum uppskotum til semju gerst samlaða úrslitið av byggiroknskapunum fyri bæði byggistigini fylgjandi:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Glyvursvegur 5. Byggistig: | hall á | kr. | -615.485,- | |
| Glyvursgevur 6. Byggistig: | avlop á | kr. | 178.782,- | |
| Nettoúrslit: | hall á | kr. | 463.997,- | v. mvg |

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið til semju. Víst verður til frásøgn nr. 11 frá fundi í bygginevndini, j. nr. 2007-1283/19.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir nevndini til at taka undir við uppskoti til semju við SEV og FT-Net um helvtarbýti, galdandi fyri Glyvursvegur 5. byggistig (j. nr. 2008-0257) og Glyvursvegur 6. byggistig (j. nr. 2008-1295), og, um avgjørt verður at taka

undir við semjuni, at beina málið um fígging í hesum sambandi, í býráðið um fíggjarnevndina, við tilmæli um hvussu hallið skal fíggjast.

**Tilmæli frá umsitingini:**
Vísandi til tilmæli frá bygginevndini um at gera semju við SEV og FT-Net, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at fíggja írestandi upphædd álj. kr. 463.997,- fyri 5. og 6. stig av Glyvursvegi,- av íløgum fyri vegir 2012, §6, kto. 8175 – Glyvursvegur.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av máli 2011-1940

**138/12** **<u>2011-1940</u>**

**<u>Umsókn frá SEH um at fáa flutt virksemið hjá Húsavørðatænastuni til matr.nr. 1384, Tórshavn.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Sámal Erik Hentze søkir vegna Húsavørðatænastan, við skrivi dagfest 20. august 2011, um loyvi til at flyta verkstaðið hjá Húsavørðatænastuni S/pf oman í ognina matr. nr. 1384, Tórshavn.

Talan er um lagur sum inniheldur tilfar og amboð, umframt skrivstovu.

Sum er húsast Húsavørðatænastan í bygninginum á Hjalla, matr. nr. 1og. Hoyvík.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Ásetingarnar fyri bygging á ognini matr. nr.138bv eru:

Almenna byggisamtyktin:
Umráðisparturin C1 í 3. grundumráði í, har ásetingarnar m.a. eru, at:
Umráðispartarnir verða í síni heild lagdir til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarhøli, samkomuhús og tílíkt.
Útstykking innan teir einstøku umráðispartarnar verður einans loyvd, um hon hóskar við heildarbyggiskipan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri umráðispartin.
Byggistigið má ikki fara upp um 0,4.
Nettonýtslustigið má ikki fara upp um 0,5.

Serstaka byggisamtyktin nr. 3:
Umráðisparturin B3 í, har ásetingarnar m.a. eru:
At eindirnar B eru til miðstaða-endamál og eindirnar B3 kunnu bert verða nýttar til handilsbúðir, skrivstovur, fyrisiting, heilsubótarhøli, byggingar til mentanar-endamál (bókasavn, kykmyndahøll o. a.) og tílíkt.
Á eindunum B1, B2 og B3 kann bert verða bygt eftir endaligum heildarbyggiskipanum fyri alt B1, B2 og B3. Tó kann á eindunum B1, B2 og B3 verða bygt eftir endaligum byggiskipanum fyri partar av B1, B2 ella B3, um hesar eru í samsvari við álagdu vegleiðandi heildarbyggiskipanina (sbr. 4. gr.,bart b.). Fæst ikki semja við býráðið um innihaldið í skipanunum, verða tær fastlagdar í uppískoyti til hesa byggisamtykt. Býráðið kann gera vegleiðandi heildarbyggiskipanir fyri eindirnar B1, B2 ella B3.

Heildarætlanarskipan er gjørd fyri øki (hjálagt) og eftir hesi skipan er matr. nr. 1384 lagt til Felagsøki, fyribils ikki almenn

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Ognin er matr. nr. 1384
Adressan er Eystari Ringvegur 2
Eigari er sp/f S.E.H.
Víddin á grundstykkinum er 716 m²
Ábygt er eitt sethús sum er í ringum standi.

Sambært tí korttilfari, sum vit hava frá heildarætlanskipanini, so er økið ikki ætlað at byggja á. Økið er lagt út til felagsøki, fyribils ikki alment.
Hetta merkir, at tá heildarætlanin er gjørd, hevur ætlanin verið at økið fram við Eystara Ringvegi skuldi liggja sum óbygt felagsøki, ella fríøki.

Hetta er eisini grundin til, at fyrrverandi eigarin Kvik-køkar ikki fingu loyvi til at byggja ein handilsbygning á økið, hetta er okkara j.nr. 2006-3453.

Seinni verður BankNordik eigari av ognini og hava teir bjóða Tórshavnar kommunu ognina til keyps fyri kr. 1,0 mió. Kommunan tók ikki av tilboðnum, hetta er okkara j.nr. 2010-2050.

Síðani selur BankNordik ognina til Húsavørðatænastuna.

SEH hevur fingið munnliga at vita frá umsitingini, at tað fer neyvan at bera til at geva loyvi til at byggja ein vinnubygning á ognini, vísandi til ásetingarnar fyri økið og tí at fyrrverandi eigarin Kvik-køkar hava fingið noktandi svar uppá tað sama.

SEH vil hava at vita frá kommununi, hvat hann kann fáa loyvi til at nýta ognina til, um hann kann byggja eitt nýtt hús, um hann tekur verandi hús niður og hvat hann so kann byggja, herundir verkstaðsbygning, dupulthús, sethús o.s.v.

Um kommunan ikki vil loyva nýbygging, er SEH sinnaður at selja stykkið til kommununa og finna aðra loysn til virksemi hjá Húsavørðatænastuna.

**Frávik:**
Umsóknin inniber fylgjandi frávik:
Umsóknin er ikki í samsvari við heildarætlanskipanini fyri økið, har økið er lagt út til felagsøki, fyribils ikki alment.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 4-5 fyri virkisbygning og umhvørvisstigi 1 um talan verður um bústað og/ella skrivstovu.

**Fíggjarligt:**
Ynski um at kommunan keypir ognina um umsóknin ikki verður gingin á møti.
Kann hava fíggjarliga bindingar fyri kommununa.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Víst verður til skjal nr.. 2011-1940/6

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Er ikki sent øðrum myndugleikum.

**Skjøl:**

| | |
| --- | --- |
| Umsókn | j.nr. 2011-1940/1 |
| Notat | j.nr. 2011-1940/2 |
| Kort yvir miðstaðarøkið á Hálsi | j.nr. 2011-1940/3 |
| Yvirlitskort | j.nr. 2011-1940/8 |

**Ferðslunevndin 17. januar 2012:** Nevndin mælir til, at spurningurin um atkomuviðurskiftini til og frá matr.nr.1384 skal taka støði í ferðslutrýstinum frá einum vanligum sethúsi út á ein ringveg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at loyvi verður givið til at byggja hús fyri hús, eftir ásteingunum sum eru í A1 økinum. Ella í øðrum lagi at kommunan tekur upp samráðingar við umsøkjaran um at kommunan keypir ognina, at nýta lendið til framtíðar ferðsluloysnir á økinum.

Bogi Andreasen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2012:** Nevndin samtykti at beina málið í fíggjarnevndina viðvíkjandi spurninginum um, um kommunan er sinnað at keypa ognina og um kommunan ikki keypir ognina, at geva byggiloyvi til at byggja hús fyri hús, eftir ásteingunum, sum eru í umráðispartinum A1.

**Tilmæli:**

Leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin, mæla frá at keypa grundøkið.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at heimila umsitingini at taka upp samráðingar við eigaran um at keypa ognina. At leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

**Ískoyti.**
Løgdeildin hevur tosað við Sámal Erik Hentze. Han er sinnaður at selja húsini til kommununa fyri uml. kr. 850.000,00, sum samsvarar áleið við tær útreiðslur, sum hann hevur havt av keypinum, íroknað fíggjarútreiðslur.

Keypsprísur kr. 850.000,00 + tinglýsingarútreiðslur kr. 5.250,00.Um húsini skulu takast niður, er mettur kostnaður kr. 100.000,00 afturat.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov, tekur ikki undir við at keypa ognina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen, mæla til at keypa ognina vísandi til, at tað er óheppið, at bygt verður nærhendis eini teirri mest ferðslutungu rundkoyringini í landinum.

Borgarstjórin krevur málið fyri býráðið.

**Býráðið 31. mai 2012:** Kunnað varð um málið.

Heðin Mortensen fór av fundi kl. 18.35. Sjúrður Olsen tók yvir formanssessin í hansara fráveru.

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2011-1819.

139/12 **<u>2011-1819</u>**

**Viðv. ognini matr. nr. 35, Bakkavegur 2, 176 Velbastaður**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Eigarar: Mannbjørn Mortensen og Gitte Mortensen.

Á ognini eru ábygd eini hús. Húsini eru bygd út um mark, og er ynski hjá eigarunum at kunna keypa lendið frá Tórshavnar kommunu og frá Føroya jarðargrunni, soleiðis at húsini kunnu standa á einum matrikli.

Umleið 20-25 fermetrar eru inni á matr. nr. 3a, (Føroya jarðargrunnur)
Umleið 5 fermetrar eru inni á matr. nr. 36, (Tórshavnar kommuna)
Umleið 42 fermetrar eru inni á matr. nr. 35, (Manbjørn og Gitte Mortensen)

Skriv er komið frá Búnaðarstovuni 29. mars 2012 (2011-1819/3), har kommunan verður biðin um at ummæla at Mannbjørn/Gitte keypa umleið 25 fermetrar av lendi frá Føroya jarðarráð.

Mannbjørn og Gitte, søkja eisini kommununa um at kunna keypa hesar uml. 5 fermetrarnar.

Um marknaðarumskipanin verður avgreidd, verður matrikul nr. 35 uml. 72 m², til víddar, og koma sethúsini tá at liggja innan fyri matrikulmark.

Byggisamtykt: Grundøkið liggur á G. økið. (Neyst og bátapláss).

Húsini sum liggja á grundøkinum verða brúkt til summarhús/sethús.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin viðmæla at Búnaðarstovan selur 25 fermetrar til matr. 35 av matr. 3a á Velbastað.
Viðmælt verður eisini at Tórshavnar kommuna selur 5 fermetrar av matr. 36 til matr. 35 Velbastaður, til at reglulera grundøkið við, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14 mai 2012:**Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli.**
Leiðarin í starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mælir til at selja umleið 5 fermetrar burtur av matr. nr. 36 til matr. nr. 35 Velbastaður. Keypsprísur kr. 600,00 m² + útreiðslur til matrikulering.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og leiðaranum á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyristingarstjóranum.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2010-0725.

**140/12** **2010-0725**

**Umsókn frá Sp/f P. P. Faroe Pelagic um langtíðar leigu av øki á havnarlagnum í Kollafirði, til bygging av frystigoymslu og goymslu til pakning.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Sp/f P. P. Faroe Pelagic søkir um loyvi at leiga lendið millum frystigoymsluna hjá Samskip og uppsjóvarvirkið hjá felagnum. Økið, sum talan er um, er umleið 4.600 $m^2$ til víddar.

Eisini søkir felagið um loyvi at leiga lendi upp á 350 $m^2$ til goymslu av pakningi.

Frystigoymsla:
Sp/f P. P. Faroe Pelagic byrjaði sítt virksemi í desember 2009. Síðan virkið opnaði aftur, eru fleiri útbyggingar gjørdar, og er framleiðsluorkan í løtuni umleið 900 tons/døgnið, men málið er at koma upp á 1.200 tons.
Brúk er fyri størri goymslu, og við egnari goymslu, fær virkið betri stýrt øllum liðum, frá tí at rávøran verður keypt til liðugvøran verður avskipað.
Umsøkjarin sigur víðari, at teir koma eisini at hava tørv á at nýta frystigoymsluna hjá Samskip.

Umsøkjarin ynskir at byggja á øllum økinum frá tí verandi pelagiska virkinum til frystigoymsluna hjá Samskip. Goymslan skal verða eins høg og breið, sum goymslan hjá Samskip.
Ynski um at goymslan skal verða eins breið og tann hjá Samskip kemur av, at tað skal vera lættari at binda bygningarnar saman, og at tað soleiðis kann verða arbeitt undir taki alla tíðina.
Goymslan er tá 20 m frá bryggjukantinum.

Goymsla til pakking:
Felagið ynskir at útbyggja verandi pakningsgoymslu.
Ynski er um at byggja goymsluna oman úr vestara horni á pelagiska virkinum, 20 m frá bryggjukantinum.

Frástøða til bryggjukanti:
Verandi frystigoymsla á økinum er 20 m frá bryggjukantinum. Tórshavnar havn heldur, at avstandurin er ov lítil, serliga tá hetta verður í einum samanhangandi strekki upp á umleið 190 m. Um avstandurin er ov lítil, kann hetta avmarka nýtsluna av bryggjuni. Tað er trupult at framtíðartryggja nýtsluna, men ein avstandur til bryggjukantin upp á 25 m er meira hóskandi, og er hetta galdandi bæði fyri frystigoymsluna og goymsluna av pakningi.
Umsøkjarin nevnir, at bygningurin má verða eins breiður og tann hjá Samskip, fyri at tað kann koyrast inni millum bygningarnar, men hetta letur seg gera hóast nýggi bygningurin er 5 m smalri, við at gera smávegis tillagingar.
Ynski er frá umsøkjaranum um at byggja bygningarnar saman. Í hesum sambandi má havast í huga, at tað er ein hurð í eystara enda á goymsluni hjá Samskip.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðispartinum B2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Grundøkið, matr. nr. 320s, Kollafjørður, er uml. 5.600 m² til víddar.
Ábygt er eitt pakkhús.

**Frávik:**
Umsóknin er um lendi

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarligt:**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Viðmerkingar frá havnameistaranum:**
Bygging av frystigoymslu er fult í samsvari við byggisamtyktina, og ætlanin hevur alla tíðina verið, at økið skal brúkast til at vaksa um virksemið hjá antin frystigoymsluni ella uppsjóvarvirkinum.

Samskip eigur verandi frystigoymslu á økinum. Í løtuni taka teir ímóti stórum parti av fiskinum, sum verður virkaður á uppsjóvarvirkinum.

Í 2006, hevði felagið ætlanir um at byggja uppí goymsluna, og fingu teir tá tilsøgn um at leiga økið, men ætlanin datt niðurfyri, tí fortreytirnar broyttust. Endaligur leigusáttmáli bleiv ikki gjørdur.

Økið, sum talan er um at byggja á, verður í løtuni brúkt av Samskip til bingjupláss. Um økið verður leigað út til bygging af frystigoymslu, kunnu bingjuskipini hjá Samskip ikki leggja at har, men mugu ístaðin vísast til økið á Oyrareingjum.

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar, j.nr. 2010-0725/18
Bentley, støðumynd

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin viðmæla at gera leiguavtalu um lendið, við teimum viðmerkingum havnameistarin hevur frammanfyri, treytað av góðkenning í havnanevndini, og beina málið til havnanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

- Aftan á viðgerðina í byggi- og býarskipanarnevndini, er umsøkjarin kunnaður um, at tað verður umhugsað at geva teimum loyvi til at byggja 25 m frá bryggjukantinum, ístaðin fyri 20 m frá bryggjukantinum.
Umsøkjarin hevur síðani enn einaferð sett fram ynski um at kunna byggja 20 m frá, sum er eins nær bryggjukantinum og verðandi frystigoymsla. Tað verður víst á, at innandura gongdin framman fyri goymsluna má vera 10 m fyri trygdarviðurskiftini hjá arbeiðsfólkunum, og at goymslan kemur av minka við knapt 2.000 tonsum.

Umsøkjarin hevur eisini fingið uppskot um 25 ára standard langtíðar leigusáttmála fyri grundøki á havnalagnum, sum hann sigur seg taka undir við.

**Viðmerkingar frá havnameistaranum:**
Um goymslan skal víðkast, má tað verða móti bryggjukantinum, tí tað verður bygt heilt í vegin omanfyri.

Um vit skulu tryggja, at økið framman fyri goymsluna kann brúkast til so nógv ymisk endamál í framtíðini, skal hetta økið hava eina hóskandi breidd. Tá umsøkjarin nú enn einaferð setir fram ynski um, at kunna byggja 20 m frá bryggjukantinum, eiga vit at umhugsa at ganga ynskinum á møti, tí tað er umsøkjarin, sum skal virka á økinum.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:**
Mælt verður til at ganga umsóknini frá Sp/f P. P. Faroe Pelagic á møti, og leiga teimum tað umleið 5.000 $m^2$ stóra økið til bygging av frostgoymslu og goymslu til pakning. Fráleikin frá bryggjukantinum má í minsta lagi vera 20 m.

Leigusáttmálin verður sambært standard langtíðar leigusáttmála fyri grundøkir á havnalagnum. J.nr. 2012-1177.

**Havnarnevndin 21. mai 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2012-0321.

**141/12** **<u>2012-0321 SG</u>**

**Müllers Pakkhús - umvæling**

**Samandráttur:**
Í sambandi við umvælingararbeiðið í Müllers pakkhúsi hevur arkitektavirkið Kontrast gjørt tilmæli um, hvat arbeiði kann gerast í Müllers pakkhúsi í 2012 fyri ta játtan á 1 mió kr., sum sett er av á íløguætlanini fyri 2012.

Fyribils tíðar- og arbeiðsætlan og kostnaðarmeting er lýst niðanfyri:

| | |
|---|---|
| Februar: | prosjekt uppá gólv móti jørð og gólvhita - útboð og kontrahering |
| Mars-apríl: | útinning av gólvhita og gólv móti jørð (- og páskaferia) |
| August: | prosjekt uppá strálihita - útboð og kontrahering |
| September: | útinning av strálihita |
| September: | prosjekt uppá hitablásarar - útboð og kontrahering |
| November: | útinning av hitablásarum |

Tað vil siga, at húsið er tøkt til og við februar - síðan aftur í mai, juni, juli, august- og aftur í desember (eisini tøkt í november, um hitablásarar ikki verður framt).

Mælt verður til at bjóða út í undirhondsboð (á sama hátt sum Reinsaríið), fremja gólv og gólvhita fyrst, síðan strálipanel og seinast hitablásarar. Síðstnevnda (hitablásarar) verður tikið burturúr, um fíggjarviðurskiftini ikki loyva hesum.

Fyribils kostnaðarmetingin er henda: Fyrsti partur, gólvið, er mett at kosta kr. 584.375 íroknað ráðgeving og mvg. Annar partur, strálhiti og hitablásarar, er mett at kosta 384.625 íroknað ráðgeving og mvg. Byggileiðsla og eftirlit er mett at kosta kr. 85.000 íroknað mvg. Samlaður kostnaður er fyribils mettur til 1.054.000 íroknað mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at umvælingararbeiðið í 2012 fer fram eftir uppskotinum omanfyri, og at játtaðar verða 1 mió. kr. av íløgum 2012 til endamálið.

**Mentamálanevndin 8. februar 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta 1 mió. kr. av íløgum fyri 2012 til verkætlanina og at heimila umsitingini at taka upp samráðingar við ráðgevan um ráðgevaraavtalu at leggja fyri mentamálanevndina.

**Býráðið 23. februar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, eftir áheitan, biðið PB Consult um at kanna møguleikan og kostnaðin við at upphita gólvini við sjóvarhita í staðin fyri vanligan oljufýrdan gólvhita.

PB Consult hevur í uppriti frá 26.03.12 lýst møguleikarnar hesum viðvíkjandi. Kostnaðurin fyri loysnina við sjóvarhita til gólvið hækkar úr kr. 150.000 til kr. 250.000. Eisini skal peningur brúkast til at gera tøknirúm á uml. 20 m2, sum undir øllum umstøðum skal gerast til sprinklaraskipan v.m., tá alt húsið verður innrættað, men sum má framskundast og gerast til tøknirúm til sjóvarhitan eisini.

Arkitekturin hevur í heildarætlanini fyri Múllers Pakkhús mælt til at gera tøknirúmið í skráanum við inngongdina til miðhæddina í erva. Men nú kommunan/Tórshavnar Havn hava keypt niðurbrendu grannaognina, er tað eisini møguligt at stoypa eitt slíkt tøknirúm omaná verandi kjallaragólv í niðurbrenda húsinum.

Kostnaðurin av at framskunda byggingina av tøknirúminum er mettur at verða uml. kr. 280.000 afturat. Eyka fíggjartørvurin í mun til áður játtaða peningin er sostatt mettur at verða kr. 100.000 + 280.000 = 380.000 kr.

Ein møguleiki er at útseta alt gólvarbeiðið, sum longu er samtykt, og fíggja sjóvarhitaskipanina við teimum pengum, sum eru játtaðir til gólvið. Annar møguleiki er at flyta aðra íløgujáttan til endamálið. Á íløguætlanini fyri 2012 grein 5 Mentan og frítíð konta 5375 Mentanartiltøk o.a. er játtan sett av til fyrireiking at skipa og víðka Skálatrøð sum virknan miðbýarpart eitt nú við denti á mentanarstovnar. Múllers Pakkhús er týðandi mentanarpallur hjá kommununi og partur av sama øki.

**Tilmæl:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at hita Múllers Pakkhús við sjóvarhita og játta kr. 400.000 av íløgukontu 5375 Mentanartiltøk o.a. til endamálið.

**Mentamálanevndin 16. mai 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2007-1961.

**142/12** **<u>2007-1961</u>**

**<u>Skúlin á Argjahamri, restupphædd</u>**

Saldoin á verkætlanini - Skúlin á Argjahamri L 41006 – er gjørd upp, og restupphæddin er 600.000 kr.

Ætlanin er, at restupphæddin verður brúkt til:

| | |
|---|---|
| Heilsufrøði | 100.000 kr. |
| Innbúgv til Látrið | 200.000 kr. |
| Gardinur til miðrúmið | 100.000 kr. |
| Skúlagarðin | 100.000 kr. |
| Økið til fótbóltsvøll | 100.000 kr. |

Heilsufrøðingurin hevur eini høli í økinum við námsfrøðiliga tænastudepilin. Aftrat teimum skal hann brúka bólkarúmið hjá tannlæknanum til størri bólkar og til serligar kanningar, og í tí sambandinum er neyðugt at gera nakrar tillagingar.

Látrið er eitt innandura uppihaldsøki hjá næmingunum. Ætlanin er at fáa innbúgv og ymisk amboð í hølini, so tað verður meira innbjóðandi hjá næmingunum at nýta hetta økið í skúlanum.

Neyðugt er at fáa gardinur í miðrúmið, tí ljósið er so mikið sterkt, at tað ber ikki til at brúka tað stóra løriftið til framløgur o.a.

Ætlanin er í samráð við skúlan at gera útiøkið ( skúlagarðin ) meira avbjóðandi.

Til fótbóltsvøllin varð tikið av økinum hjá barnagarðinum, og í tí sambandinum varð avgjørt at endurrinda barnagarðinum fyri tað.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at restupphæddin á 600.000 kr. verður brúkt til heilsufrøði, innbúgv til Látrið, gardinur til miðrúmið, skúlagarðin og útiøkið hjá barnagarðinum.

**Mentamálanevndin 16. mai 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt Samtykt.

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2012-0028.

**143/12** **2012-0028**

**Kloakk fram við Hoydalsá – Óluvugøtu – Svartafoss**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við reinsan av Hoydalsá manglar nú kloakkin frá Óluvugøtu-Svartafossi at verða gjørd, fyri at áin á hesum staðnum verður rein.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Biðið verður um kr. 200.000 til projektering og kanningararbeiði, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión Víst verður annars til skjal 2012-0028/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 12. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, at leggja fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin tann 24. apríl 2012, og inn komu 4 tilboð. (Listitatiónsprotokol j. nr. 2012-0028/6).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Higartil eru fíggjarðar kr. 200.000,- til projektering. Við støði í lisitatiónsúrslitinum verður írestandi fíggjartørvur álj. kr. 980.000,- sambært skjali nr. 2012-0028/7. Sostatt er samlaði fíggjartørvurin kr. 1.180.000,-

Sambært íløguætlanini fyri kloakkir 2012 eru settar 7 mió. kr. av til ymsar verkætlanir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka við lægsta tilboðnum frá Sp/f Andrias Berg og játta kr. 980.000 til kto. §6, 6875, L68013. Mælt verður eisin til at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

Bogi Andreasen kom á fund kl. 18.55.
Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av máli 2008-3134.

**144/12** **2008-3134 EY**

**Høvuðsprojekt-Nevndarviðgerð: Rundkoyringin Sundsvegur – Blómubrekka - Óluvugøta**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Víst verður til mál j.nr. 2005-2344: Dispositiónsuppskot: Rundkoyring Sundsvegur – Blómubrekka – Óluvugøta.

Dispositiónsuppskotið hevur verið til "Ferðslutrygdargrannskoðan" hjá Viatrafik, sí j. nr. 2008-3124/1.
Somuleiðis hevur Viatrafik gjørt eitt projektuppskot við koyrikurvum, sí j. nr. 2008-3125/1. Projektuppskotið er broytt nakað í mun til dispositiónsuppskotið.

Umsitingin hevur gjørt ráðgevingaravtalu við LBF P/f um projektering og eftirlit viðvíkjandi rundkoyringini. Víst verður til j. nr. 2008-3127/1.

Ráðgevingarfyritøkan LBF P/f hevur gjørt høvuðsprojekt, sí j. Nr. 2008-3132/1, grundað á projektuppskotið frá Viatrafik.

Rundkoyringin hevur ein diametur upp á 37 m við 3 m gongu- og súkklubreyt.

Atlit eru tikin til estetik, og at møguleiki verður at planta vøkstur í skráarnar. Eisini verður grótgarður laðaður, har tað er neyðugt.

**Fíggjarviðurskiftir:**
LBF P/f hevur gjørt eina kostnaðarmeting av arbeiðnum, sí j. nr. 2008-3133/1.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað projektering og eftirlit, umsiting, óvæntaðar útreiðslur, reinskan av vegvatni og 6,25% mvg, sí j. nr. 2008-3133/2.

**Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi:**
1. Endaliga góðkenning av høvuðsprojektinum og kostnaðarmeting
2. Útbjóðingarháttur

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeiða víðari við fyriliggjandi loysn - tó so, at hædd verður tikin fyri framskrivaðum ferðslutrýsti á økinum við støði í frágreiðing frá Rambøl Nyvig frá apíl 2008 um Innkomuvegin til Havnar (sí mál nr. 2001-0407) og annars at projektið tekur hædd fyri verkætlanini viðv. dagføringini av Sundsvegnum (sí mál nr. 2008-1294).

**Tekniska nevnd 12. juni 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Umsitingin hevur heitt á ráðgeva um at gera uppskot til eina tveysporaða rundkoyring. Víst verður til TK j. nr. 2008-3132/2. Tilkoyringarvegurin Sundsvegur er ætlaður til at verða tveysporaður í framtíðini, meðan tilkoyringarvegirnir Blómubrekka og Óluvugøta verða einsporaðir vegir í framtíðini.

**Keyp av lendi:**
Lendisviðurskiftini verða broytt nakað í mun til fyrra uppskotið, og má hesin spurningurin takast upp við eigararnar av matr. nr. 1464a, 1466.

**Fíggjarviðurskifti:**
Umsitingin hevur heitt á ráðgevan LBF P/f um at gera eina kostnaðarmeting av dupultrundkoyringini, sí skjal nr. 2008-3133/3.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað projektering og eftirlit, umsiting, óvæntaðar útreiðslur, reinskan av vegvatni og 6,25% mvg, sí j. nr. 2008-3133/4.

**Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi:**
1. Endaliga góðkenning av høvuðsprojektinum og kostnaðarmeting

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna høvuðsprojektið og kostnaðarmetingina og at málið um útvegan av meira lendi verður beint í fíggjarnevndina til at taka upp samráðingar við lendiseigararnar.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at umsitingin leggur uppskotið við ítøkiligari kostnaðarmeting fyri nevndina aftur, áðrenn arbeiðið verður boðið út.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanum at byggja tónlistarskúla á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið og við vegaíbinding til Sundsvegin, skal støða takast til um ikki vegamótið Sundsvegur/Óluvugøta/Blómubrekka skal dagførast við ætlaðu rundkoyringini. Málið um gerð av rundkoyring hongur eisini saman við alsamt væntandi øktari ferðslu í sambandi við atkomuvegin til Havnar. Harumframt kann væntast økt ferðslutrýst í sambandi við íbúðarbygging á økinum millum Blómubrekku og Villingardalsvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at nevndin, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, raðfestir avseting av 8,6 mió. kr. (smb skjal nr. 2008-3133/2) til at gera útbjóðingartilfar til rundkoyringina at leggja fyri nevndina aftur, og at fremja arbeiðið, á íløguætlanini fyri 2012.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Málið umrøtt.

Sjúrður Olsen luttók ikki.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Nevndin samtykti at umsitingin, ísv. við málið um dagføring av Sundsvegnum, j. nr. 2008-1294, kannar ymsar vegaloysnir á vegamótinum Sundsvegur-Óluvugøtu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við øðrum vegaloysnum á vegamótinum. Greitt verður frá hvørjari loysn kommunan kundi arbeitt eftir.
Settar eru 2 mió. kr. av til rundkoyring við Óluvugøtu fyri fíggjarárið 2012 (§6 konto 8175).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri 2012 (§6, kto. 8175) til projektering av skitsuuppskoti við kostnaðarmeting, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at játta kr. 200.000 av íløgum fyri 2012 av konto 8175 til projektering av skitsuuppskot og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitignin hevur saman við ráðgeva latið gera skitsuuppskot við kostnaðarmeting. Greitt verður frá uppskotunum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við skitsu nr. 5, VFS 14.05.2012, sí j. nr. 2008-3134/x-x.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskoti, skitsa 3A, VFS 10.05.2012, sí j. nr. 2012-0370/10 og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 300.000,00 av konto 8175, vegir.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av máli 2012-0671.

**145/12** **2012-0671 KF**

**Umsókn frá Øssur av Steinum um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 247, Kollafjørður, frá 4. gr. til A1-øki.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Ognin matr. nr. 247, Kollafjørður, Inni á Firði 103 beint yvirav innkoyringini til havnarøkið á Langasandi. Ognin liggur í 4. grundumráði.

Umsøkjarin sigur, at hann í 1966 keypti tvey grundstykkir á 1450 $m^2$ og 390 $m^2$ og eina ognartrøð. Í 70-árunum vóru bæði grundstykkini og ognartrøðin løgd saman uttan hansara vitan til matr. nr. 247.

Umsøkjarin ynskir at grundstykkini skulu verða frábýtt trøðni og broytt til bústaðarøki "aftur".

Hesi grundøki liggja í 4. grundumráði og hava helst ongantíð verið bústaðarøki sambært byggisamtyktini.

Sambært heildarætlanini fyri Kollafjørð er hetta økið ikki lagt til bústaðarøki.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at ganga umsóknini á møti vísandi til at hetta ikki er í samsvar við heildarætlanina fyri Kollafjørð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14 mai 2012:** Ein meiriluti Elin Lindenskov, Rúni Djurhuus, Jan Christiansen og Bogi Andreasen samtyktu at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti Jákup Símun Simonsen metir at grundstykkið átti at verði býtt sundur og gjørt til bústaðarøki.

**Býráðið 31. mai 2012:** Tikið av skrá.

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2012-0902.

**146/12** **2012-0902 SC**

**Reglugerð fyri uppseting og tøming av ruskíløtum**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Heilsu- og umhvørvisdeildin hevur, í samstarvi við plan- og rakstrardeildina og lendisdeildina, tikið stig til, at gera reglugerð fyri uppseting og tøming av ruskíløtum. Tað hava áður ikki verið nakrar ásetingar fyri hvar ruskíløt verða uppsett, frástøða ímillum ruskíløtini og harvið hvussu nógv ruskíløt verða uppsett. Reglugerðin er m.a. eitt amboð, í sambandi við áheitanir frá borgarum, um uppseting av ruskíløtum.

Við reglugerðini er endamálið at:
- forða fyri at rusk rekst ella hópast upp á almennum farleiðum og plássum
- lætta um møguleikan at koma av við rusk
- økja um reinføri og harvið trivnaðin í kommununi.

Við reglugerðini er ætlanin at tryggja, at nóg nógv ruskíløt eru til taks, og at hesi verða tømd regluliga eftir tørvi. Hetta verður gjørt, við at ásett er hóskandi fjarstøða ímillum ruskíløtini, og at tømingartíttleikin av rusksíløtunum er hóskandi, í mun til hvussu nógv fólk ferðast í ymisku økjunum í kommununi, og harvið hvussu nógv rusk hópast upp.

Umframt fjarstøðu ímillum ruskíløtini ásetir reglugerðin eisini staðseting, snið (litur og stødd) á ruskíløtum, ið verða setta upp til alment reinføri í ymisku økjunum í kommununi.

Reglugerðin er galdandi innanfyri býar- og bygdarmørk (innangarðs) í Tórshavnar kommunu.

Umsitingin leggur fram reglugerðina og lýsir, hvørjar útreiðslur reglugerðin hevur við sær til m.a. uppseting av nýggjum íløtum og rakstur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur undir við reglugerðini og beinir málið í býráðið um teknisku nevnd.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 24. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ìskoyti:**
Umsitingin greiðir frá málinum.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við samtyktini í heilsu- og umhvørvisnevndini 24. apríl 2012.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av máli 2006-3283.

**147/12** **2006-3283 BH**

**Brúgvin um Sandá**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til málsgongd í málinum j. nr. 2001-0695, við býráðssamtykt av 22. mai 2003, hevur umsitingin umrøtt málið og er av tí fatan, at umráðandi er at kanna aðrar møguleikar fyri tilgongd til málið.

Umsitingin mælir tískil til at leita ráðgeving hjá serfrøðingum innan brúgvabygging við tí fyri eyga at fáa til vega hóskandi byggilistarligt snið, teknisk og fíggjarliga forsvarlig brúgvagerð, sum samstundis líkar krøvini hjá friðingarmyndugleikunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða 500.000 kr at gera arbeiðs- og byggiskrá við tilhoyrandi skitsuuppskoti til støðutakan, vísandi til mannagongd fyri verkætlanum hjá Tórshavnar kommunu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000 av íløgum.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Val av býráðslimum til bygginevnd fyri Brúnna um Sandá sambært § 36 í kommunustýrislógini

**Býráðið 27. september 2007:** Valdir vóru Jógvan Arge og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**

Umval av býráðslimum í bygginevndina Brúgv um Sandá sambært § 36 í kommunulógini.

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Sambært yvirliti yvir arbeiði fíggjað av íløgum fyri 2009 (skjal nr. 2009-2360/1), eru markaðar kr. 1.000.000,- til fyrireikingararbeiði viðv. Brúnni um Sandá, sum partur av langtíðaríløguætlan kommununar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta avsettu upphæddina á kr. 1.000.000,- til framhaldandi projektering og fyrireikingar, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundum viðgjørt spurningar til framhaldandi projektering av brúnni og í sambandi við fyrireikingarnar fer nevndin m.a. at mæla til, at arbeiðið hjá nevndini eisini skal fevna um vegastrekkini báðumegin sjálva brúnna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilmælinum í fundarfrásøgn nr. 7 (j. nr. 2006-3283/23) og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. mai 2010:** Borgarstjórin var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

Tekniski stjóri greiddi frá málinum.

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum í fundarfrásøgn nr. 7 (j. nr. 2006-3283/23) soleiðis, at arbeiðið hjá bygginevndini eisini kemur at fevna um vegastrekkini báðumegin brúnna um Sandá.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av tilgongdini av projektering av brúnni, hevur bygginevndin á fundi 4. november 2010 viðgjørt spurningin um innihaldið í einum byggiprogrammi og hvør skal bjóða uppá hetta arbeiðið. Byggiprogrammið skal fevna um:

1. Stutt frágreiðing um byggimálið
2. Almenna endamálsorðing
3. Myndugleikagóðkenningar og galdandi reglugerðir
4. Stødd á brúgv ella frágreiðing um faktisk teknisk viðurskifti.
5. Tann bjóðandi skal definera kriteriið fyri design av brúnni.
6. Hædd skal verða tikin fyri samlaðari last á brúgv – herundir neyðugu lastkombinatiónir innan galdandi normum.
7. Hædd skal verða tikin fyri geotekniskum kanningum á staðnum.
8. Frágreiðing um bygging, logistik o.a. í hesum sambandi
9. Tekniskar veitingar
10. Evt. onnur útgerð
11. Tíðarætlan og kostnaðarmeting av brúnni
12. Kostnaður/tilboð fyri byggiprogrammið
13. Tíðarfreistin at gera byggiskránna er 6 vikur.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at:

1. Taka undir við uppskotinum um byggiprogram sambært fundarfrásøgn nr. 8 skjal nr. 2006-3283/29.
2. Biðja p/f LBF og EFLA h/f um at koma við tilboði upp á byggiprogram.
3. Beina málið, um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina, í býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 2. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.
Levi Mørk var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Málið umrøtt. Verður tikið upp aftur á einum seinni fundi.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi hin 18. januar 2011 viðgjørt málið av nýggjum, og mælir til fylgjandi at leggja fyri teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til:

1. At umsitingin við neyðugari hjálp frá ráðgevum, ger uppskot til byggiskrá at leggja fyri bygginevndina, faknevdir og býráð innanfyri 6 vikur.
2. At byggiskráin tekur útgangsstøði í samtyktini í bygginevndini hin 4. november 2010
3. At talan skal verða um betongbrúgv

4. At arbeiðið verður boðið út í innbodnari heildararbeiðstøku millum upp til 5 heildararbeiðstakarar eftir uppskoti frá umsitingini
5. At hvør tilboðsgevari kann lata inn upp til 2 uppskot
6. At umsitingin ger uppskot til dømingarkriteriir og dómsnevnd at leggja fyri bygginevndina, faknevdir og býráð innanfyri 6 vikur.
7. At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. 2,0 mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tekniska nevndin 20. januar 2011:** Ein meirluti, Marin Katrina Frýdal, Sjúrður Olsen, Halla Samuelsen og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og at beina málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.
Ein minniluti, Jákup Símun Simonsen, tekur undir við tilmælinum við teirri broyting, at pkt 4: *'at arbeiðið verður boðið út í innbodnari heildararbeiðstøku millum føroysk virki'.*

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. januar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini.

**Ískoyti:**
Vísandi til pkt. 7 í tilmælinum til fíggjarnevndina hin 19. januar 2011, er av misgávum komið skeivt tal at standa um játtanina á kr. 2,0 mió. av íløgum fyri 2011. Rættað talið er kr. 2,6 mió., sambært íløguætlan kommununar fyri 2011. Tískil verður mælt til at broyta hetta sambært niðanfyristandandi tilmæli

**Tilmæli:**
Vísandi til íløguætlan kommununar fyri 2011, mæla miðfyrisitingarstjórin og tekniski stjórin fíggjarnevndini og býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd 20. januar 2011 og byggi- og býarskipanarnevndini 26. januar 2011, við hesi broyting av pkt. 7:

7. At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. **2,6** mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Fíggjarnevndin 27. januar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini við hesi broyting av pkt. 7: At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. **2,6** mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram tilboð frá ráðgevum um byggiætlan til heildararbeiðstøku.

**Tilmæli:**

Vísandi til at bert eitt tilboð kom inn, mælir býarverkfrøðingurin til at taka av tilboðnum, sent við teldubrævi tann 4. Apríl 2011 frá P/F LBF áljóðandi kr. 148.000.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og taka av tilboðnum Frá 4. apríl 2011 frá P/f LBF áljóðandi kr. 148.000.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um status í málinum um byggiskránna.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Kim K. Hansen og Eyðbjørn Brimnes, frá Landsbyggifelagnum, kunnaðu um status í málinum um byggiskránna.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram byggiskrá, ið hevur verið viðgjørd í bygginevndini.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við framlagda uppskotinum.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram endurskoðaða byggiskrá, ið aftur hevur verið viðgjørd í bygginevndini.

**Tekniska nevnd 18. oktober 2011:** Tikið av skrá.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at taka undir við uppskotinum.

**Tekniska nevnd 8. november 2011:** Kunnað var um málið.

**Umval av býráðslimum í bygginevndina Brúgv um Sandá sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 14. desember 2011:** Valdir vórðu Levi Mørk og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Nevndin skal taka støðu til útbjóðingina av arbeiðinum at bjóða upp á heildararbeiðstøku . Umsitingin kunnar annars um gongdina í málinum.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at bjóða P/F TG-Verk, P/F Articon og P/F J&K Petersens Contractors til lisitatiónina.

**Tekniska nevnd 19. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum. Harumframt mælir Jákup Símun Simonsen til at seta sum treyt, at høvuðsráðgeving verður gjørd av føroyskum virki.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram endaligt útbjóðingartilfar til støðutakan. Saman við byggiskránni verður framløgd frágreiðing frá ráðgeva um jarðfrøðiligu kanningarnar á økinum, har brúgvin kemur at standa. Eisini verður útbjóðingartilfar til staðsetingina av rundkoyringunum báðum framlagt. Kunnað verður um niðurstøðurnar í bygginevndini.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at góðkenna útbjóðingartilfarið og bjóða arbeiðið út.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

Harumframt mælir Jákup Símun Simonsen til at seta sum treyt, at høvuðsráðgeving verður gjørd av føroyskum virki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2012:** Nevndin hevur ongar viðmerkingar til útbjóðingartilfarið.

**Fíggjarnevndin 31. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. mai 2012:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Jógvani Arge um at seta sum treyt, at høvuðsráðgeving verður gjørd av føroyskum virki.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Jan Christiansen, Vagnur Johannesen, Annfinn Brekkstein, Maria Hammer Olsen og Levi Mørk.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av máli 2012-0223.

148/12 **2012-0223**

**Matr. nr. 135np, Hoyvík**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Felagið ætlaði upprunaliga at byggja ein bygning á ognina á Karlamagnussarbreyt, men metti felagið at tað er ein betri og lættari loysn at keypa grundøkið við ástandandi bygningi.

BankNordik fíggjar ætlanina, sum umframt leiguinntøku eisini er baserað uppá at felagið fær eginogn til vega við sølu av grundøkinum á Karlamagnussarbreyt.

**Tilmæli.**
Leiðarin í starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at fylgja vanligari mannagongd og ikki at taka stykkið innaftur, uttan so at annar keypari er til stykkið.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Vísandi til, at talan er um ein hjálparfelagsskap, mælir fíggjarnevndin býráðnum til at keypa stykkið aftur frá Reyða Krossi fyri somu upphædd, sum stykkið varð selt Reyða Krossi fyri. Umsitingin vísir á fígging á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 31. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum at játta kr. 497.815,57 av konto L69001, Karlamagnussarbreyt.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

Bogi Andreasen fór av fundi kl. 19.10.
Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2010-2041.

149/12 **2010-2041**

**Viðvíkjandi leigusáttmálum uppá neystini úti í Bakka.**

**Talan er um til samans 8 neyst.**

Kommunan eigur grundøkini við ástandandi neystum, sum verða leigaði út til niðanfyri nevndu leigarar.

**5 sambygd neyst undir húsunum hjá Jóhan MacDonald (Mynd 2010-2041/4)**

*Leigararnir eru:*

2010-1914 Jens Dam (akkurát deyður)

2010-1904 Petra Arge (brúkari Ólavur Arge)

2010-1913 Jóannes Skaale ( hevur yvirtikið sáttmálan eftir Sigfried Skaale )

2010-1905 SSB skótarnir, hava ongantíð havt sáttmála

2010-0571 Hans og Tummas Sørensen, sum hava sáttmála galdandi til 30. nov. 2014 (Hans er deyður, Tummas er sonur Hans)

2010-2408 Hans Jákup Michelsen. Hans Jákup Michelsen keypti í 1993, neystið frá Jens av Reyni. Upplýst verður, at Axel Mortensen bygdi neystið síst í 60árunum.

**<u>Neyst bygt uppímóti húsagrundini hjá Jóhan MacDonald. ( Mynd 2010-2041/4 )</u>**

2010-2408 Hans Jákup Michelsen. Sambært skjali, keypti Hans Jákup Michelsen í 1993, neystið frá Jens av Reyni.
Axel Mortensen bygdi neystið síst í 60árunum. Síðani hevur neystið havt ymiskar eigarar. ri Klæmint Ludvíg, Jens av Reyni og nú Hans J. Michelsen. Vit finna ongan sáttmála í málinum.

**Harumframt er talan um tvey leys rimaneyst longur inni móti Vágsbotni. ( Mynd 2010-2041/5)**

> 2009-2939 Annað neystið verður leigað út til Inga Mohr sála. Sonur Inga, Gunnar Mohr, søkir nú um at yvirtaka sáttmálan

Hitt neystið er í tveimum leigumálum:

2010-1895 Helena Poulsen (fyrrv. Símun Poulsen, deyður)

2010-1896 Jørleif Kúrberg (fyrrv. Bjarni Djurhuus flutti til DK í 1997)

Brúkarar av neystinum hjá Bjarna Djurhuus eru: Bátafelagið, Jørleif Kúrberg, og Ríkisumboðið.

Neystið er ikki skilt at, og er bert tann eina inngongdin.

**Lýsing av málinum:**
Miðfyrisitingin hevur umrøtt málini viðvíkjandi neystunum.

- Sáttmálarnir eru ikki tíðarhóskandi.
- Mannagongdir vænta. ( reglur um ættarliðskifti )
- Eingin bíðilisti er til neystini.
- Kommunan hevur viðlíkahaldsskyldu av neystunum.

- Einki krav er til nýtslu av neystunum.

Eingin bíðilisti er til neystini og eru heldur ongar niðurskrivaðar mannagongdir viðvíkjandi umsitingini av leigumálunum.

Vanligi borgarin hevur lítlan og ongan møguleika til at fáa atgongd til neystini, sum hava gingið í arv í fleiri ættarlið. Ættarliðskifti hevur verið fyrilagt fíggjarnevndini so hvørt.

Neystaleigan hevur higartil verið kr. 60,00 pr. ár. Fyri hesa upphædd fær leigarin eitt grundøki við ástandandi neysti til leigu, samstundis sum kommunan hevur viðlíkahaldskylduna av neystunum.

Neystini liggja í einum serstøkum umhvørvi, og eru neystini so mikið smá, at tey bert kunnu brúkast til smærri og lættari bátar. Tey innaru neystini kunnu illa brúkast til bát, tí umstøðurnar kring neystini ikki eru til tað. Høgur bryggjukantur + koyrivegur.

Løgdeildin hevur hugt eftir neystunum.

Neystini undir húsunum hjá Jóhan Macdonald sýnast at vera í nýtslu og eru væl hildin. Bátur stendur inni í 4 av neystunum. Eitt stendur tómt. Eitt av neystunum er blendað og sæst ikki inn.

Neystið hjá Hans J. Michelsen, er í vánaligum standi, og treingir til ábøtur. Hans J. greiðir frá, at hann hevur umvælt framsíðuna av neystinum, og hevur hann nú ætlanir um at umvæla takið og síðuna. Hann greiðir frá, at Kiwanis er brúkari av neystinum, og hevur hann ætlanir um at lata Kiwanis neystið til nýtslu, men ynskir hann í fyrsta umfari at gera ábøturnar á neystið og at undirskriva nýggjan leigusáttmála við kommununa.

Í tí eina neystinum longur inni, er rættuliga órudduligt, og sýnist neystið ikki væl hildið. Tvær kajakkir liggja inni hesum neystinum.

Hitt neystið er væl hildið, og hevur Bátafelagið tilfar liggjandi inni, sum verður brúkt til bryggjudansin. Harumframt goymir Ríkisumboðið ymiskt sum hoyrir til bátin Torshavn, inni í sama neysti. Ein gamal bátur hongur undir loftinum.

Verandi leigarar sum eru í neystinum, hava trupult við at semjast um neystið. Helena Poulsen, sum leigar helvtina av neystinum, hevur okkum kunnugt ikki brúkt neystið, men eru døturnar nú áhugaðar í neystinum.

Ósemjan snýr seg millum annað um eitt lás og um atgongdina til neystið. Um hvør skal hava lykil til neystið, og um at Bátafelagið hevur lagt ymiskt tilfarð inn á helmingin hjá Helenu Poulsen.
Tað skal viðmerkjast at kommunan ikki hevur tosað við Helenu um málið. Samskiftið hevur verið við einu dóttur hennara sum er búsitandi í Danmark.

Kommunan ynskir ikki at vera partur av málinum, og mugu brúkararnir finna eina loysn sínámillum.

Umsitingin hevur umhugsað 3. møguleikar til framhaldandi nýtslu av neystunum.

Verandi sáttmálar verða uppsagdir, og fáa verandi leigarar bjóðaðan nýggjan sáttmála. Sí hjálagda sáttmála sum er journaliseraður undir mál 2010-2041/3 Samstundis verður sum higartil møguligt at søkja um ættarliðskifti.

Verandi sáttmálar verða uppsagdir, og verða neystini framyvir bjóðaði kappróðrar/- og øðrum áhugafelagskapum til leigu. Skúlar/frítíðarskúlar og líknandi, kundu tá eisini fingið møguleikan at brúkt neystini í samstarvi við omanfyri nevndu feløg. Um so var kundu kannska fleiri hundrað brúkarar verið knýttir at neystunum, og kundu neystini tá í nógv størri mun enn nú verið nógv fleiri borgarum at gagni.

Verandi sáttmálar verða uppsagdir, og verða neystini lýst til sølu til hægstbjóðandi. Undirlendið undir neystunum verður leigað keyparunum. 30 ára langtíðarsáttmálar.

Umsitingin hevur eisini gjørt uppskot til nýggjan leigusáttmála.

Ætlanin er at leigan verður hækkað, men verður leigan ymisk alt eftir um talan er um privatleigumál, ella um talan er um leigu til ítróttar/áhugafeløg.

Harumframt er eisini talan um í tí eina førinum, um at leiga undirlendið til neystið tí neystið er privatogn.

Sáttmálarnir verða yvir 3 ár, og kunnu tá endurnýggjast eftir umbøn.

Fyri tey neyst sum eru ogn, og har ið kommunan eigur undirlendið, verður leigumálið yvir 10 ár, og kann endurnýggjast, um báðir partar ynskja tað.

Sambært grein 3. í sáttmálanum, kemur leigarin eisini at hava innan- og uttanveggja viðlíkahald av neystinum, herundir at síggja til, at neystið við jøvnum millumbilum, verður málað við svartari máling. Her verður hugsað um rimaneystini undir Bakka og neystið hjá Hans Jákup Michelsen

Neystini ( húsagrundin ) sum er undir húsunum hjá Jóhan Mc.Donald, skulu málast hvít og neystahurðarnar svartar.

Sambært grein 4. í sáttmálanum skal neystið einans verða brúkt til bát, í javnan verður brúktur, og neyðug amboð í hesum sambandi. Tá ið talan er um almannagagnligt virksemi, kann kommunan í ávísum førum gera undantak frá hesi áseting, men er tað tá ein treyt, at virksemið er tengt at sjónum.

**Tilmæli:**

Leiðarin av løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin, mæla til at kommunan:

- Uppsigur verandi leigusáttmálar.
- Bjóðar verandi leigarum nýggjan sáttmála sum er skrásettur undir mál 2010-2041/3 og Hans J. Michelsen sáttmála sum er skrásettur undir mál 2010-2408/2
- Bjóðar tey neystini út til róðrarfeløg, ítróttarfeløg og møgulig áhugafeløg, har møguligir verandi leigarar ikki ynskja at skriva undir nýggjan sáttmála.
- Prísásetur leiguna til kr. 500,00 pr. ár. um neystini verða leigað út til ítróttarfelag/áhugafelag og til kr. 5.000,00 pr. ár. um talan er um privatleigumál.
- Prísásetur leiguna til ávikavist kr. 500,00 og kr. 2.000,00 pr. ár. fyri teir sáttmálar sum umfata undirlendið undir neystunum, tí neystini eru privatogn.

**Fíggjarnevndin 17. november 2010:** Samtykt at siga upp allar leigusáttmálar við stytst møguligari freist og gera nýggjan leigusáttmála við teir leigarar, sum vilja ganga undir hesar treytir: Leigarin hevur viðlíkahaldsskyldu innan og uttan, leigan verður hækkað til 2.500 kr. um árið, og leigumálið skal brúkast til endamálið, ið er at goyma bát og reiðskap og virksemið, ið er knýtt at sjónum.

Tey leigumál, ið ikki verða endurnýggjað, verða eftir umsókn latin áhugafelagsskapum, kappróðrarfeløgum, skúlum, frítíðarskúlum og øðrum almannagagnligum endamálnum, og verða hesi at ganga undir somu viðlíkahalds- og aðrar treytir sum ásett omanfyri, tó so at leigan hjá hesum verður ásett til 1.000 kr. um árið.

**Ìskoytið:**
Neystini úti í Bakka eru partur av eini størri heild, frá Vágsbotni út í Skinnaraskjer/Rasmusarbrúgv. Tað er eitt økið, sum um summari er væl vitja av fólki. Her er útilív og sera hugnaligt at ganga. Tað eru tí ynskir um at skapa eina størri heild á økinum við útatvendum virksemi.

Tórshavnar havn arbeiðir eisini við ætlanum um at fríðka um økið og leggja fleiri bátabrúgvar út. Hetta arbeiðið er komið væl áleiðis.

Kommunan hevur eisini í fleiri ár arbeitt við at skapa lív í Vágsbotnið við útivirksemið av ymiskum slag.

Í Tórshavnar Býaratlas'ið verður skrivað: "*Goymsluhúsini undir Bryggjubakka standa við sínum takskjøldrum sum ein virðismikil framsíða móti havnarlagnum. Bryggjan verður í dag mest brúkt til parkeringar, men har verður eisini fiskur seldur, og ein kaffistovan borðreiðir úti, tá ið veðrið er til vildar. Kanska er hetta*

*ein varislig byrjan til eina "havnapromenadu" við lívd og sól, sum kundi ført til fleiri uttanduratiltøk framman fyri teimum niðastu húsahæddunum, umframt færri parkeringar og nýggja útgerð av ymiskum slag á bryggjuni"(s. 23).*

**Tilmæli**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin fyri løgdeildina mæla tí fíggjarnevndini til at heita á Byggi- og býarskipanarnevndina um at gera eina heildarætlan fyri økið frá Vágsbotni til Skinnaskjer/Rasmusarbrúgv við tí endamálið at skapa eina "havnapromenadu" við útivirksemið av ymiskum slag.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mars. 2011:** Nevndin samtykti at umsitingin í samráð við Tórshavnar Havn ger eina ætlan fyri økið.

Bogi Andreasen hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Vísandi til samtyktina í fíggjarnevndini 16. februar 2011 verður rykt eftir uppskotinum til eina heildarætlan fyri økið frá Vágsbotni til Skinnarasker/Rasmusarbrúgv at taka støðu til sum skjótast.

**Ìskoytið:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt uppskot til heildarætlan fyri økið við Vágsbotn og undir Bryggjubakka.

Heildarætlanin inniheldur broytingar av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og Reyn og eitt uppskot til skipan av økinum frá Vágsbotni til Skinnarasker/Rasmusarbrúgv.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla fíggjarnevndini til at taka undir við heildarætlanini og senda málið til býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

Bogi Andreasen hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Býararkitekturin greiddi frá uppskotinum til heildarætlan. Samtykt at taka undir við uppskotinum til heildarætlan og beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina við áheitan um at broyta serstøku byggisamtyktina samsvarandi uppskotinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2012:** Nevndin samtykti at málið um broytingar í serstøku byggisamtyktini skal verða eitt mál fyri seg, sum verður lagt fyri nevndina aftur á komandi fundi.

**Býráðið 31. mai 2012:** Tikið av skrá.

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2012-0824.

150/12 **2012-0824/3**

**Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Tórshavn, Hoyvík, Sund, Mjørkadalur og Norðradalur og Koltur til býráðsvalið 13. november 2012.**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Tórshavn, Hoyvík, Sund, Mjørkadalur og Norðradalur og Koltur til býráðsvalið 11. november 2008, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Bjørgfríð Ludvig, Christian Christiansen, Birgith Dahl Bærentsen og Guðrið Rubeksen.

**-** Av tí at Guðrið Rubeksen er flutt úr kommununi, skal nýggjur limur veljast fyri hana.

**Býráðið 2. mai 2012:** Vald Barbara Vang og Rókur Tummassarson.

- Christian Christiansen hevur sagt seg úr valstýrinum.

**Býráðið 31. mai 2012:** Skotið varð upp at velja Petur Elias Petersen í valnevndina fyri Christian Christiansen, og varð uppskotið einmælt samtykt.

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2008-4663.

151/11 **2008-4663**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í sosialu nevnd**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |
| Bogi Andreasen | Jákup Símun Simonsen |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Levi Mørk | Rúni Djurhuus |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |

**Býráðið 31. mai 2012: :** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2008-4664.

**152/12** **2008-4664**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í mentamálanevndina**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Maria Hammer Olsen | Elin Lindenskov |
| Jákup Símun Simonsen | Marin Katrina Frýdal |
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |

Annfinn Brekkstein Sjúrður Olsen

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Maria Hammer Olsen | Elin Lindenskov |
| Halla Samuelsen | Jákup Símun Simonsen |
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |
| Vagnur Johannesen | Bogi Andreasen |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Rúni Djurhuus | Elin Lindenskov |
| Halla Samuelsen | Jákup Símun Simonsen |
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |
| Vagnur Johannesen | Bogi Andreasen |

**Býráðið 31. mai 2012:** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Maria Hammer Olsen | Elin Lindenskov |
| Halla Samuelsen | Jákup Símun Simonsen |
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |
| Vagnur Johannesen | Bogi Andreasen |

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2008-4665.

**153/12** **<u>2008-4665</u>**

**<u>Val av 5 limum og tiltakslimum í teknisku nevnd</u>**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Bogi Andreasen |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |

| | |
|---|---|
| Jákup Símun Simonsen | Jógvan Arge |
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Sjúrður Olsen | Annfinn Brekkstein |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Jákup Símun Simonsen | Elin Lindenskov |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |
| Levi Mørk | Rúni Djurhuus |
| Jákup Símun Simonsen | Elin Lindenskov |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen |

**Býráðið 31. mai 2012:** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Jákup Símun Simonsen | Elin Lindenskov |
| Sjúrður Olsen | Jan Christiansen |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen |

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2008-4666.

**154/12** **<u>2008-4666</u>**

**<u>Val av 5 limum og tiltakslimum í byggi- og býarskipanarnevndina</u>**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

**Fastir limir:** **Tiltakslimir:**

| | |
|---|---|
| Bogi Andreasen | Marin Katrina Frýdal |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Jógvan Arge | Jákup Símun Simonsen |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Jákup Símun Simonsen | Jógvan Arge |
| Bogi Andreasen | Vagnur Johannesen |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Levi Mørk | Rúni Djurhuus |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Jákup Símun Simonsen | Jógvan Arge |
| Bogi Andreasen | Vagnur Johannesen |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**Býráðið 31. mai 2012:** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Jákup Símun Simonsen | Jógvan Arge |
| Bogi Andreasen | Vagnur Johannesen |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2008-4668.

**155/12** **2008-4668**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í heilsu- og umhvørvisnevndina**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Levi Mørk |
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |
| Bogi Andreasen | Jákup Símun Simonsen |
| Maria Hammer Olsen | Halla Samuelsen |
| Jan Christiansen | Vagnur Johannesen |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Levi Mørk |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Maria Hammer Olsen | Halla Samuelsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |
| Bogi Andreasen | Vagnur Johannesen |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Levi Mørk |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Rúni Djurhuus | Halla Samuelsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |
| Bogi Andreasen | Vagnur Johannesen |

**Býráðið 31. mai 2012:** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Levi Mørk |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Maria Hammer Olsen | Halla Samuelsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |
| Bogi Andreasen | Vagnur Johannesen |

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2008-4669.

**156/12** **2008-4669**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í havnanevndina**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jákup Símun Simonsen | Bogi Andreasen |
| Maria Hammer Olsen | Halla Samuelsen |
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Levi Mørk | Elin Lindenskov |
| Vagnur Johannesen | Jan Christiansen |

**Ískoyti:**
Minnilutin, sum nú telur 5 limir, hevur biðið um at allar nevndirnar verða valdar av nýggjum.

**Býráðið 29. september 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jákup Símun Simonsen | Marin Katrina Frýdal |
| Maria Hammer Olsen | Levi Mørk |
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jákup Símun Simonsen | Marin Katrina Frýdal |
| Rúni Djurhuus | Levi Mørk |
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**Býráðið 31. mai 2012:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jákup Símun Simonsen | Marin Katrina Frýdal |
| Maria Hammer Olsen | Levi Mørk |
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Vagnur Johannesen | Annfinn Brekkstein |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2008-4673.

**157/12** **2008-4673**

**Val av 3 limum og tiltakslimum í hýruvognsnevndina**

**Býráðið 20. november 2008:** Vald vóru

| **fastir limir:** | **tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Bogi Andreasen |
| Halla Samuelsen | Maria Hammer Olsen |
| Sjúrður Olsen | Annfinn Brekkstein |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vóru

| **fastir limir:** | **tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Bogi Andreasen |
| Halla Samuelsen | Rúni Djurhuus |
| Sjúrður Olsen | Annfinn Brekkstein |

**Býráðið 31. mai 2012:** Vald vóru

| **fastir limir:** | **tiltakslimir:** |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Bogi Andreasen |
| Halla Samuelsen | Maria Hammer Olsen |
| Sjúrður Olsen | Annfinn Brekkstein |

Heðin Mortensen og Bogi Andreasen luttóku ikki í viðgerðini av máli 2009-0272.

**158/12** **2009-0272**

**Val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrini.**

Sambært §50 í løgtingslóg nr.125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr.64 frá 7.juni 2007, skal kommunustýri velja umboð í skúlastýrini.

2 kommunustýrisumboð skulu veljast í hvørt stýri, men tá færri enn 20 næmingar eru í einum skúla, skal 1 kommunustýrisumboð veljast. Valskeiðið hjá kommunuumboðunum er valskeiðið hjá kommunustýrinum.

Í Tórshavnar kommunu eru 12 fólkaskúlar. Skúlarnir eru hesir: Argja skúli, Venjingarskúlin, Tórshavnar Kommunuskúli, Sankta Frans skúli, Eysturskúlin, Hoyvíkar skúli, Skúlin við Løgmannabreyt, Kollafjarðar skúli, Kaldbaks skúli, Velbastaðar skúli, Hests skúli og Nólsoyar skúli.

Í Hests skúla eru færri enn 20 næmingar.

Býráðið skal sostatt velja 23 umboð í skúlstýrini umframt eykaumboð.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu:

**Kommunuskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Maria Hammer Olsen | Levi Mørk |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |

**Venjingarskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |

**Eysturskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Vagnur Johannesen | Sjúrður Olsen |

**Sankta Frans skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |

**Argja skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Sjúrður Olsen | Vagnur Johannesen |

**Hoyvíkar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Jógvan Arge | Jákup Símun Simonsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |

**Kollfjarðar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Vagnur Johannesen | Sjúrður Olsen |

**Kaldbaks skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Jógvan Arge | Bogi Andreasen |
| Sjúrður Olsen | Vagnur Johannesen |

**Nólsoyar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Bogi Andreasen |
| Karlot Hergeirson | Jógvan Thomsen |

**Velbastaðar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Bogi Andreasen | Marin Katrina Frýdal |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |

**Hest skúli**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Jákup Símun Simonsen | Maria Hammer Olsen |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**Býráðið 14. desember 2011:** Vald vórðu:

**Kommunuskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Rúni Djurhuus | Levi Mørk |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |

**Venjingarskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Bogi Andreasen | Jan Christiansen |

**Eysturskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Vagnur Johannesen | Sjúrður Olsen |

**Sankta Frans skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Levi Mørk | Rúni Djurhuus |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |

**Argja skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Sjúrður Olsen | Vagnur Johannesen |

**Hoyvíkar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Jógvan Arge | Jákup Símun Simonsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |

**Kollfjarðar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Levi Mørk | Rúni Djurhuus |
| Vagnur Johannesen | Sjúrður Olsen |

**Kaldbaks skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Jógvan Arge | Jákup Símun Simonsen |
| Sjúrður Olsen | Vagnur Johannesen |

**Nólsoyar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Annfinn Brekkstein | Jógvan Thomsen |

**Velbastaðar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |

**Hest skúli**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Jákup Símun Simonsen | Rúni Djurhuus |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**Býráðið 31. mai 2012:** Vald vórðu:

**Kommunuskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Maria Hammer Olsen | Levi Mørk |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |

**Venjingarskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Bogi Andreasen | Jan Christiansen |

**Eysturskúlin:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Vagnur Johannesen | Sjúrður Olsen |

**Sankta Frans skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |

**Argja skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Sjúrður Olsen | Vagnur Johannesen |

**Hoyvíkar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Jógvan Arge | Jákup Símun Simonsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |

**Kollfjarðar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Vagnur Johannesen | Sjúrður Olsen |

**Kaldbaks skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Jógvan Arge | Jákup Símun Simonsen |
| Sjúrður Olsen | Vagnur Johannesen |

**Nólsoyar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Annfinn Brekkstein | Jógvan Thomsen |

**Velbastaðar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Jógvan Arge | Marin Katrina Frýdal |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |

**Hest skúli**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Jákup Símun Simonsen | Maria Hammer Olsen |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**FUNDUR LOKIN KL. 19.30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Maria Hammer Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |